# Kemiski Ali deyðadømdur




Eitt systkinabarn Saddam Hussein, fyrrverandi irakiska einaræðisharran, er nú dømdur til deyða av einum irakiskum rætti fyri fólkamorðið á 180.000 kurdar í 1988. Ali Hassan al-Majid, betri kendur sum »Chemical Ali« fyri at nýta kemisk vápn móti kurdum og øðrum, varð dømdur fyri fólkamorð. Tveir aðrir ákærdir vórðu eisini dømdir til deyða, meðan aðrir tveir fingu lívlangt fonsgul. »Chemical Ali« var sjálv ímyndin av ræðuleikunum, ið vórðu framdir móti kurdunum í 1988

# 60 mió at vinna

Hetta er triði leygardagur á rað, at eingin rakar tey sjey vinnaratølini, og nú rýkur »jackpot«-vinningurn frá einum meti til annað. Leygarkvøldið, var vinningurin methøgur við 34 milliónum krónum, og tá eingin fekk tey sjey tølini á sama raði, verða hesar milliónirnar fluttar til komandi vikskifti. Tað merkir, at lottovinningurin er útvið 60 milliónir. Men ikki nóg mikið við tað. jokarin, sum støðugt veksur, fann heldur ongan góðan í kvøld, so tær 15,6 milliónirnar rulla víðari til komandi vikuskifti eisini, og tá verður jokarin væntandi verdur 18 milliónir.

# Byggitøkningar útbúnir

**Fríggjadagin vóru 10 byggitøkningar verið uppi til próvtøku. Hetta eru teir fyrstu síðani 1988**

PRÓVTØKA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Útbúgvingin sum byggitøkningur er ikki nýggj her á landi. Men kortini eru liðin 19 ár, síðani seinastu næmingarnir fingu prógv í hesari lærugrein í Føroyum.

Orsøkiner hon, at útbúgvingin varð niðurløgd tá kreppan byrjaði at gera um seg í Føroyum. Men fyri tveimum árum síðani varð farið undir aftur hesa útbúgvingina, og tá talan er um tvey-ára útbúgving var tíðin komin til endaliga próvtøku.

Útbúgvingarleiðari er Jóhan Eli Ellendersen, sum sjálvur er útbúgvin á Vitus Bering Danmark, ið er skúli fyri verk- og byggifrøðingar. Hann varð biðin at koma til Føroya júst fyri at fáa hesa útbúgvingina upp at standa aftur.

Tá umsóknarfreistin var úti fyri tveium árum síðani, høvdu 35 søkt. 18 vórðu tiknir inn, men tríggir fullu frá eftir stutta tíð og ein mátti gevast vegna sjúku. Haraftrat valdu fýra næmingar at lesa víðari niðri eftir hálvtannað ár í Føroyum, og tí vóru tað bert tíggju næmingar, sum fóru upp til endaligu royndina í dag.

Væl má sigast at hava gingið, tí Jóhan Eli kundi siga, at meðal próvtøkutølini vóru heili 9,6.

Útbúgvingin fer fram í samstarvi við Vitus Bering skúlan í Danmark, og lesandi í Føroyum verða tikin inn á V. B. Á jøvnum føti við aðrar útbúgvingar í Danmark.



*Frá próvtøkuni á Tekniska skúla. Fremst á myndini Jóhan Eli Ellendersen, útbúgvingarleiðari*

# Danskt eingin trupulleiki

**Nógv hevur verið gjørt burtur úr, at næmingarnir til próvroyndinaí byggitøkni máttu tosa danskt. Men hetta var eingin trupulleiki, metti íslendski próvdómarin**

PRÓVTØKA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Íslendski próvdómarin, Jón Eirikur Gudmundsson, helt tað hava verið eina spennandi uppgávur at meta um verkætlanirnar hjá føroysku næmingunum við tekniska skúlan. Og tað var ikki heilt av tilvild, at tað júst gjørdist Jón Eirikur, sum fekk hesa uppgávuna.

Íslendingurin er sjálvur útbúgvin á Vitus Bering skúlanum í Danmark, har útbúgvingarleiðarin fyri byggitøkningaútbúgvingini í Føroyum, Jóhan Eli Ellendersen, var lærari í fleiri ár.

Jón Eirikur Gudmundsson varð útbúgvin í 1987, og heimaftur komin til Íslands hevði hann sjálvstøðuga fyritøku, til hann fyri níggju árum síðani byrjaði sum lærari á IÐN-skúlanum (tekniska skúla) í Reykjavík innan byggifrøði á sokallaðu Meistaradeildini.

Íslendski próvdómarin er sera væl nøgdur við tað, føroysku næmingarnir løgdu fram, og tað góða við samstarvinum við Vitus Bering er, at grundarlagið er júst tað sama sum í Danmark. Tað merkir, at uppgávurnar eru á júst sama støði, sum tær á Vitus Bering.

Til tað, at næmingarnir máttu tosa danskt sigur Jón Eirikur, at tað á ongan hátt tóktist at darva teimum. Hann heldur tvørtur ímóti, at tað er gott fyri næmingarnar at tosa danskt til próvtøkuna, tí teir skulu jú lesa víðari í Danmark, og tá er tað ein fyrimunur at hava roynt danskt til eina próvtøku áður.



*Íslendski próvdómarin, Jón Eirikur Gudmundsson*